## DAGSINS MEINING

# Satsa har vit hava førleikarnar

Hóast vánaligar konjukturar gera seg galdandi í búskapinum hjá stórum pørtum av føroyskum vinnulívi, so eru tað tó tey, sum mennast og bróta upp úr nýggjum. Eitt av hesum feløgum er Thor í Hósvík, sum í dag hevur skip síni í arbeiði á mestum øllum heimsins høvum - frá Norðsjónum til Mexikanska Flógvan og til strendur Afrika. Thor, sum hevur ment sítt virksemi stig fyri stig - og hevur valt at hava fleiri bein at standa á tvs. bæði fiskiskip og frálandaskip - gjørdi nú um dagarnar enn eina íløgu í framtíðina, tá tað keypti eitt frálandaskip í Noregi fyri umleið 20 mill. kr. Skipið kom fyri fyrstu ferð á Hósvík í vikuskiftinum og fær skipið navnið "Thor Supplier" . Talan er um ein kombinerðan supply- og standbybát. Tvs. at hann bæði kann flyta væru til og frá oljupallum og hava vaktarhald við pallin. Ætlanin er at brúka nýggjasta skipið í Thor-flotanum sum veitingarskip hjá seismikkskipum í byrjanini. Sáttmáli er gjørdur við Mærsk um uppgávur í danska partinum av Norðsjónum.

Hesi tíðindini, sum vit høvdu í gjár eru sera áhugaverd. Tey eru ikki bert áhugaverd, tí talan er um ein vinnuligan glotta, men eisini tí, at her er talan um eina vinnuliga hending, sum eigur at fáa okkum at steðga á og hugsa okkum um. Í hesum døgum verður javnan talað um, at Føroyar eiga at finna nýggjar vinnur. Vit mugu finna nýggj bein at standa á, vit mugu hava alternativ til fiskivinnuna. Víst verður á KT, á úrdráttir úr innvøli á fiski, á ferðavinnuna, á mentanarídnaðin o.m.a. Tað tykist, sum viti í hesum orðaskifti gloyma tað, sum er mest nærliggjandi, tá talan er um at finna alternativ til fiskivinnuna. Í eini støðu, har alternativ til eina høvuðsvinnu skulu finnast eigur ein fyrst og fremst at leita eftir møguleikum á økjum, har fólkið frammanundan er dugnaligt. Vit føroyingar duga alt, sum hevur við havið og sjógvin at gera. Tað er ikki tómt reyp, tá ið tað verður sagt, at vit eiga heimsins besta sjófólk. Tað er í upplagt at royna at menna vinnur, sum eru knýttar at havinum. Vit eiga at statsa, har vit hava førleikarnar. Tað er við hesum í baksýni, at Thor-flotin er so áhugaverdur. Leiðslan hevur funnið nakrar røkur, har vit duga eins væl ella betri enn okkara kappingarneytar. Hetta er ivaleyst ein orsøk til, at henda verkætlanin hjá hósvíkingum tykist at fara at eydnast.

Tað er einki at ivast í, at tað eru stórir møguleikar fyri føroyskt vinnulív á ymsum økjum við tænastuveitingum á sjógvi. Væl vita vit, at kappingin frá lagslønarlondum er hørð og støðugt harðnar, men vit hava so tann fyrimunin, at neyvan nakar megnar tað, ið vit megna tá talan er um alt, sum hevur við sjómanskap og rakstur av skipum at gera. Vit hava altso enn nakrar førleikar, sum gera okkum sterk í kappingarhøpi. Tað ræður tí um at varðveita og menna hesar førleikar. Tað gera vit m.a. við støðugt at menna sjómansskúlarnar og við at tryggja teimum nóg mikið av lesandi. Sum kunnugt knípur við hesum síðsta, og er hetta kanska ein tann største avbjóðingin hjá skúlum og útbúgvingarmyndugleikum í dag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjúkrahúslóg í 1/2 fyrstu viðgerð

**Hergeir Nielsen**



Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur lagt eitt uppskot um nýggja sjúkrahúslóg til tingsins viðgerð, og fyrsta viðgerð var mánadagin 7. mars 2005.

Málið stóð í hálvari fyrstu viðgerð, tá ið landsstýrismaðurin stakk av, so flestu spurningar okkara standa ósvaraðir.

Høvuðstættirnir í hesi lóggávu eru at miðsavna sjúkrahúsverkið, og ikki eru tað smávegis amboð, ið nýtt verða.

- minstukrøvini um læknamanning á smærru sjúkrahúsunum hvørva úr lógina,
- visitatiónsrættindini hjá læknunum á somu sjúkrahúsum fara sama veg,
- og sjúkrahúsráðini við somu sjúkrahús verða syft út um somu dyr.

Hesin miðsavnandi politikkur er so ógvusligur, at stórar ristingar longu eru farnar gjøgnum alt tað føroyska heilsuverkið.

Rákið var í okkara tíð at leggja út til kommunurnar so nær brúkarunum sum gjørligt. Nú rekur øvugtan veg.

Meðan rákið var at menna smærru sjúkrahúsini, er siktið nú, at tey skulu enda sum skaðastovur.

Medsin-, røntgen-, eygna-, anæstesi-, oyrna- og hálslæknar eru sjáldan og ongantíð á Suðuroyar Sjúkrahúsi longur.

Tá krøvini um ein medisinskan og ein kirurgiskan yvirlækna eru horvin, eru tær funktiónirnar farnar sama veg sum allar aðrar eru farnar.

Sentralistarnir lóggeva nú fyri, at ábyrgdin skal takast frá yvirlæknunum og kompetensan flytast til Havnar.

Hvør tímir tá at vera lækni?

Vit vita sum er, at læknar seta karreriuna ovast á listan, og neyvan teljast fallkomin sjúkrahús millum tey mest lokkandi hjá tílíkum monnum.

Skaðin er hendur, og landsins leiðsla hevur longu kunnað læknaverðina um, at hon stevnir eftir í minsta lagi tveimum fallkomnum sjúkrahúsum í Føroyum.

Neyvan eyðnast okkum, sum royndu at reka ágangin aftur av tingi, at rætta tann skaða uppaftur, sum landsstýrismaðurin hevur skapt, men vit fara kortini at royna sum frægast.

Tað er Javnaðarflokkurin, sum stendur fyri avrættingini, og tað er Hans Pauli Støm, sum tekur kvørkratakið um sjúkrahúsini.

Spurningar okkara vóru ikki svaraðir undir fyrstu viðgerð, og málið stendur í 1/2 gekki.

Landsstýrismaðurin hvarv, og skulkaði sær undan at viðgera sítt egna uppskot saman við tingmonnum.

Umvegis útvarpið frættu vit sama kvøldið, at landsstýrismaðurin var farin til Suðuroyar at leggjast á eitt annað mál, sum løgtingið hevði avgreitt og játtað pening til.

Í longri tíð hevur hann roynt at forða fyri, at ein miðnámsskúli verður bygdur í Vági eftir løgtingslóg og játtan, og á Tvøroyri stríðist sami maður við at gera av við almanna- og heilsuskúlan, sum vit løgdu har.

Skúlarnir eru ein menningandi fortreytin fyri trivanði og framburði, og sjúkrahúsið er ein avgjørd fortreyt fyri, at vit kunnu búleikast í oynni.

Hvat ilt Suðuroyggin hevur gjørt Hans Paula Strøm og Javnaðarflokkinum er ikki gott at vita, men atsóknirnar tykjast ongan enda fáa.

# Hotel Runavík letur nú upp



**Runavík:** Herfyri frættist, at nýggjur leiðari varð settur á Runavíkar Sjómansheimi. Andreas Andreasen var maðurin, sum skuldi reka hetta gistingarhúsið víðari eftir at tað hevði verið stongt í eina tíð.

Eftir at hava fyrireikað seg í eina tíð er hann nú komin so mikið langt við fyrireikingum sínum, at hann komandi leygardag fer at hava almenna móttøku í Runavík.

Henda móttøkan verður leygardagin frá kl. 12 til 15. Í sambandi við upplat-ingina verður eisini ein listaframsýning við verkum eftir Magna Mikkelsen av Toftum.

Samstundis við at nýggi leiðarin hevur tikið yvir, hevur ein samstundis avgjørt at dagføra navnið eitt sindur. Hereftir verður navnið "Hotel Runavík – Sjómansheimið".

**sb**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo

Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo

Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**

Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo

Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo

Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo

Snorri Brend snorri@sosialurin.fo

Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**

Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**

Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**

Postsmoga 231

Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík

tel. 458686 fax 458687

e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**

tel. 375364 fax 375464

tel. 228814

e-post: aki@sosialurin.fo

e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**

360 Sandavágur

tel. 333820, 220507 fax 333720

e-post: edvard@sosialurin.fo

e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**

Uppseting: Føroyaprent

Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**

Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**

Mán.-frí. 8-16

Argjavegur 26,

Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**

Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**

post@sosialurin.fo

lysing@sosialurin.fo

lysingartorg@sosialurin.fo

varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.

Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**

Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.